# a í mans stað



*MC og Johan Restorff avmyndaðir saman við nýggju stjórunum á hotel Hafnia, Ása Johnsdóttir og Birna Gaard*
*Mynd: Jens K. Vang*

frá, og tað lýsir av honum, at hann er sannførdur, at hann hevur tikið ta røttu avgerðina.

## Ov mikið at gera

Brøðurnir Restorff fara ikki at liggja á latu síðuni nú, fyri tað um teir nú ikki longur eru í hotelvirkseminum.

MC hevur átikið sær ymsar uppgávur umframt at hann hevði fleiri, áðrenn hotellið varð selt. Hann hevur altíð fingist nógv við tónleik, og tað millum annað hevur hann eisini gjørt, síðani hann tók seg úr hotellinum fyri einum knappum ári síðani. Hann hevur eisini átikið sær uppgávur sum forstandari til ymisk tónleikalig tiltøk og hevur sendingar á Lindini.

– Man má royna at finna sær annað at gera, tí hóast mær dámar væl at syngja fyri fólki, so er tað mangan sjálvboðið arbeiði, og tað mettar jú ikki nakran, sigur 54 ára gamli MC.

Johan, sum er 65 ára gamal, sigur, at hann gleðir seg at fáa meira tíð saman við konuni. Tey bæði hava onga summarfrítíð havt, so tað verður eitt tað fyrsta, sum liggur fyri framman. Ein ferð saman við konuni, har tey bara kunnu kopla úr og njóta tilveruna. So eiga tey eisini ommu- og abbabørn bæði í Føroyum og í Danmark.

Johan sigur, at ein av abbasynunum er í ferð við at gerast professionellur fótbóltspælari í Onglandi. Christian Restorff Mouritsen eitur hann.

– So nú fara vit frá hotelvirkseminum yvir í fótbóltin. Eg havi sagt við hann, at hann skal nýta Restorff, tá hann vinnur, og Mouritsen tá hann tapir, sigur Johan, og báðir flenna teir í kíki.

Eisini dámar Johan sera væl at vera á floti. Flennandi greiðir hann frá, at hann hevur fingið sær ein krók upp á bilin til jolluna.

– So fólk mugu ikki gerast ov bilsin, um tey brádliga síggja meg í Tjørnuvík ella undir Leitinum í Hvannasundi á floti í jollu. Eg og konan bæði, sigur hann skemtiliga, men álvarin hoyrist eisini aftan fyri róligu røddina.

Hann heldur fram, at sonurin, Martin, sum arbeiddi á hotellinum saman við MC og Johan eisini hevur onkrar spennandi ætlanir fyri framman, sum hann ætlar sær at stuðla honum við heilum hjarta.

– Eg sigi onki, um hvat tað er, sigur hann og MC leggur afturat, at sjálvt ikki hann veit, hvat er í umbúnað.

Martin, sum er yngri sonur Johan´s, hevur verið heima í trý ár, og hann hevur arbeitt sum tænari og restaurationschefur á kendum matstovum í Keypmannahavn.

– Martin hevur verið við til at lyft støðið á matstovuni á Hafnia seinastu árini. Og tað at MC gjørdist mettur á Hafnia, kom okkum dátt við, tí Martin hevði sæð fram til nøkur góð ár saman við okkum, har hann so kundi tikið meira og meira yvir. Tá MC ikki tók av okkara tilboði, gjørdist veruleikin tann, at vit skuldu geva hægri boð, og tá hevði Martin fingið eina tyngri uppgávu. Fyrst at loysa ættarliðsskifti hjá MC og seinni eisini mítt, greiðir Johan frá.

## Fyrsta floks hotel

Støðið á hotel Hafnia hevur altíð verið høgt. Brøðurnir hava altíð lagt seg eftir at hava alt í góðum standi. Kømurni hava verið viðlíkahildin og ístandgjørd við jøvnum millumbilum. Innbúgv er útskift, so skjótt sum teir mettu, at tað var við at gerast ov gamalt. Sumt av innbúgvinum, sum hevur staðið á Hafnia, stendur á øðrum gistingarhúsum í Føroyum í dag. Hetta síggja teir báðir als ikki, sum at teir vóru ov skjótir at selja. Heldur tvørturímóti.

– Vit vildu halda eitt ávíst støði til okkara viðskiftafólk, so tey altíð fingu tað, sum tey rindaðu fyri. Og tað hevur eisini víst seg at vera rætt, tí vit høvdu nógvar stamkundar, sigur Johan.

Ta seinastu tíðina á hotellinum hava brøðurnir nýtt til at ístandgera restaurationina umframt annað. Summi hava skýrt tað hálvavegna ørt, tí hotellið jú var selt. Men Johan greiðir frá, at avgerðin um at gera hesa nýgerð varð tikin fyri einum ári síðani, og tí skuldi tað gerast.

## Stóran samfelagstýdning

Johan Restorff leggur nøkur sannleikans orð á borðið, meðan prátið gongur lystiliga.

– Um tú fert inn í Havnina í dag, so kanst tú vera nærum alt fyri uttan. Men ikki hotel Hafnia og hotel Føroyar. Tað er bara ein spurningur, um landið hevur hugsað um, hvat fyri týdning Hafnia hevur havt fyri samfelagið. Hotellið hevur verið eitt móttøkuapparat fyri landið og hýst bæði kongaligum og øðrum gestum. Vit hava eisini sett stóra æru í tað og roynt at hildið støðið. Hetta er ikki reyp ella nakað, men bara fakta, sigur hann.

Og hann heldur fram, at tað er eitt vælsignilsi hjá honum og bróðrinum, at teir, nú teir sleppa endanum, kunnu avlevera nýggju eigarunum eina góða og trygga forrætning.

– Tað er eitt vælsignilsi, at tað ikki er av tvingsli vit selja, sigur hann.

Báðir siga teir at enda, at teir hava so nógvum menniskjum so nógv at takka fyri. Einum trúgvum vinar og kundaskara. Konum og familjuni, sum øll hesi árini hava víst tolsemi og forstáilsi fyri, at teir ofta noyddust at arbeiða nógv og longi. Serliga tey fyrstu árini.

Hotel Hafnia fer ikki í søguna. Nýtt fólk er komið í staðið hjá MC og Johan. Teir eru sera vælnøgdir við nýggju stjórarnar, tí tær kenna hvønn krók í hotellinum, og halda teir, at nýggju eigararnir ikki kundu havt valt betri egnað fólk.